TILTØK

BRÚDLEYP

Leygardagin 26. juni kl. 13.00 giftast í Sjóvar kirkju, Kristina F. Højgaard Johansen av Strondum og Jóni Rasmussen av Skála. Døguröi verður fyri innboðin í Ítróttarhøllini á Skála kl. 17.00. Vælkomst verður eftir kl. 21.

Leygardagin 26. juni kl. 16.30 giftast í Vesturkirkjuni Majbritt Bisp úr Tórshavn og Alexander Joensen, Undir Gøtueiði. Veitslan verður fyri innboðin kl. 19.00 í kantinuni á Læraraskúlanum.

Tann 29. juni giftast á Ráðhúsinum í Herning, Helma Jacobsen og Karl Dam Sinding. Í hesum sambandi hevði tað glett okkum at sæð familju og vinir til døguröa í Sinding Forsamlingshúsi fríggjadagin tann 2. juli kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 20. juni á tlf.0045 97136669.

Leygardagin 3. juli kl. 14.00 giftast í Býráðshúsinum í Klaksvík, Heidi Neshamar, Tórshavn og Jógvan Kristin Olsen, Klaksvík. Dagurin verður hildin heima, Undir Grashjalla 9, Klaksvík, frá kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 10. juli giftast Crista Sumberg Dahl og Bárður Mikkelsen, bæði úr Vági. Vígslan verður í Bethel kl. 14.00. Vælkomst verður í VB-húsinum kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá inn 20. juni á tlf. 373877, 373827 ella 314447.

10. juli kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Berghild Bjarkadóttir Skúvadal og Klæmint Mittún. Kl. 19.00 verður veitsla fyri innbodnum í HB-húsinum.

Leygardagin 17. juli giftast Charlotta Hentze, Saltangará og Remy Hansen, Nes. Vígslan verður í Berøa kl. 13.30. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn 2. juli á tlf. 447476, 509919 ella 220033.

17. juli kl. 14.00 giftast í Miðvágs kirkju Nicoleta Radu, Buzau Romenia og Óssur Hansen, Miðvágur. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, kunnu tekna seg á tlf. 556491 ella 226190. Seinasta freist at tekna seg er 5. juli.

24. juli kl. 16.00 giftast Gitte Johannesen og Finnur Klein í Dómkirkjuni. Veitslan verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00.

Leygardagin 31. juli kl. 13.30 giftast í Berøa í Saltangará Jona Thune úr Runavík og Ólavur Justinussen úr Streymnesi. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp kunnu tekna seg á tlf. 226434 og 226432. Seinasta freist at tekna seg er leygardagin 3. juli.

GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 4. juli hava hjúnini Jóna og Hans Jacob Andreasen, Klaksvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Tekniska skúla í Klaksvík leygardagin 3. juli kl. 16.00. Tey, sum vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 455782 ella 456772 innan 21. juni.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 22. juni, Eiði tlf. 42 30 06
Sunnudagin, 23. juni, Gøta tlf. 44 10 86

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

Gudstænastur
2. sunnudag e. trinitatis
Havnar kirkja: kl. 11, Bjarni Bæk
Kaldbak: kl. 12, altarg., Sonja Klein
Vesturkirkjan: kl. 11, kirkjukórið úr Húsavík í Íslandi syngur, Heri Joensen og Sighvatur Karlsson.
Kl. 16 Konsert v/ kirkjukóri Húsavíkar.
Argja kirkja: kl. 11, altarg., Bergur D. Joensen
Hvalvík: kl. 12, Inga Poulsen Dam
Gøta: kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
Rituvík: kl. 11, Meinhard Bjartalið
Søldarfjørður: kl. 11, John Myllhamar
Friðrikskirkjan: kl. 11, Dávid Johannesen
Klaksvík: kl. 11, Hans Eilar Hammer
Mikladalur: kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
Dalur: kl. 12, deyvaguðstænasta, altarg., Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri deyvameinigheitina
Skopun: kl. 12, Jákup R. Hansen
Sandvík: kl. 11,
Hvalba: kl. 12.30 Ólavur Rasmussen
Leiti: kl. 12, altarg.
Eldrabýlið Vágur: kl. 14, Patrick de Neergaard

Frelsunarherurin, Tórsgøta 19
Leygardagin kl. 11 Útifundur – um viðrar.
Sunnudagin kl. 11 møti, Finngerð Olsen talar. Bøn kl. 17.30, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Á møtinum luttaka umboð fyri OM. Ongin sunnudagsskúli. Um viðrar verður sunnudagsskúlaútferð. Farið verður frá Hebron kl. 14.00.
www.hebron.fo

Lívdin
Í Hoyvíkar skúla
(inngongdin er flutt til nýggjaskúla)
Sunnumorgunin kl. 10.30 á familjumøtinum talar Jens Wang um evnið: Truplir spurningar úr Bibliuni »Hví gav Gud menniskjanum ein frían vilja?«. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 verður evnið: »Missión og barnalegur í Norðurlondum«.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Heimasíðan: www.livdin.fo

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Mariukirkjuni.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Wladyslw Zdunek presti, í Mariukirkjuni.

Meinigheitin í Hoyvík uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ fam. Brend, evnið: Missión. Útimøti á Vaglinum kl. 22 – um viðrar.
Mánakvøldið kl. 20 Felags bønarmøti í Evangeliihúsinum.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

Frá Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl.18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin. www.ebenezer.fo

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbón.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta (seinasta áðrenn summar), ABC v/ Ása Lutzen, evnið er: Reinsan við blóði Jesusar 1. partur, kl. 18 Møti v/ Leivur Joensen.
Mánadagin kl. 20 Felags bønarmøti við Evangh., Meinigheitini í Hoyvík og Rhema í Evangeliihúsinum. Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar mána-frí frá kl. 8-16.
www.filadelfia.fo

Samkoman Rhema
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Felags bønarmøti í Evangeliihúsinum. www.rhema.fo

Missiónshúsið við Landavegin
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Sigurd Sørensen.

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúlin fer útferð, kl. 18 Útimissiónsmøti v/ Hera og Maluni Kjærbo. Manskórið syngur.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Saron, Vestmanna
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 18 við Fríðbjørn Poulsen. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

Vestmanna missiónshús
Sunnudagin kl. 19 Sanglota við Magna Christiansen og tónleikarum úr Vestmanna, Thominu og Kajberg Davidsen av Skála.

Vakhús í Sandavági
Leygardagin kl. 20 Evangel. møti.
Sunnudagin kl. 15.30 Útimøti – um viðrar. Kl. 18 Evangel. møti. Herman og Gigga syngja, Tórmund og fleiri.

Meinigheitshúsið, Sandavágur
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, har Streingjakórið úr Vágum luttekur við sangi og vitnisburði. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Miðvágs missiónshús
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, um viðrar verður skipað fyri útferð. Kl. 18 Møti/meinigheitsfundur. Aftaná verður felagsnátturði. Hjartaliga vælkomin.

Hvalvíkar missiónshús
Leygarkvøldið kl. 20 Útimøti v/ Finnur Hansen o.fl.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við luttøku úr Tjørnuvík/Vík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Evnið: Tey 10 boðini, 1. boð v/ Sverra Steinhólm. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.jesus.fo

Bønhúsið í Søldarfirði
Sunnudagin kl. 11 Lestur, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Petur J. Petersen, Saltnes. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Berøa, Saltangará
Sunnudagin kl. 11.30 Morgunmøti og Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, toftafólk luttaka við sangi og talu. Aftaná verður nátturði. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Meinigheitshúsið á Skála
Farið verður útferð við sunnudagsskúlanum sunnudagin 20. juni – um viðrar – annars verður vanligur sunnudagsskúli, møtast í Meinigheitshúsinum kl. 13.30.

Lívsins Orð, Saltangará
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Dánjal Petersen.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj, kl. 11 Barnamøti. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Missiónshúsið í Oyndarfirði
Sunnudagin kl. 16 Møti v/ John Myllhamar og Ólavi Jacobsen.

Thabor, Fuglafjørður
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

Missiónshúsið í Leirvík
Sunnudagin kl. 19 Møti v/ Frants Jensen, kl. 21 Ungdómsmøti, heimligar kreftir.

KFUM & K, Klaksvík
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Jakku Mýru. Ungdómsmøti kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Getsemane, Klaksvík
Sunnumorgun kl. 11 Møti við Poul Nicolai Steinberg.

Soli Deo Gloria
Sunnukvøldið kl. 18 Møti.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsangur, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sands missiónshús
Sunnudagin kl. 10.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Terji, Egin og Sølvi syngja.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí. Sunnukvøldið kl. 18 Møti við kórinum.
Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Drekkamuður verður aftaná møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Porkeri
Sunnukvøldið kl. 18 Møti har Streingjakórið luttekur. Hjartaliga vælkomin.

TILTØK

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur, um viðrar. Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Nimrod og Ebba luttaka við sangi, Nimrod Midjord talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøld kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert hjartaliga vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Missiónshúsið í Sumba
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Andreas Djurhuus. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bleðini eru til taks.
Mánadagur 21. juni
kl. 10-12 Opið hús
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl og onnur spøl. Tilm. til døguröan mikudagin, tlf. 316491.

Tilmelding til Sandstúrin 28.-29. juni á tlf. 316491.
Ólavsøkulistin er komin.
Týsdagur 22. juni
kl. 10 Vit syngja saman við gestum úr Skagafirði í Íslandi, Óli VAng. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14-17 Opið hús
Mikudagur 23. juni
kl. 10-12 Vit gera døguröa í Tilhaldinum. Øll eru hjartaliga vælkomin at vera við.
kl. 12 Døguröi
kl. 14-16 Undirvísing í Boccia
kl. 15 Túrur
Hósdagur 24. juni
kl. 10-17 Opið hús
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
Fríggjadagur 25. juni
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – gongutúrur
Sunnudagin 20. juni verður gongutúrur Vestmanna-Gotushálsur-Ærgisá. Túrurin er hampuliga lættur, men gingið verður 3-4 tímar. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gongukleðir og matpakka við. Tilmelding.

Eysturoyar Gongufelag
Gongutúrur verður sunnudagin 20. juni. Gingið verður úr Miðvági til Bøssdalafoss og síðani til Vatnsoyrar. Vit møtast við politistoðina í Miðvági kl. 14.00. Tilmelding ikki neyðug. Túrurin er lættur. Hav stav við.

Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin 21. juni
Dánjal í Klingruni sigur frá, »Fram við landi«, ið varð send í Útvarpi Føroya í 1977.
Mikudagin 23. juni
Vit fara túr í oynni. Nærri fæst at vita um hetta í Tilhaldinum mánadagin.

Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar
í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.
Mánadagin 21. juni
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
Týsdagin 22. juni
Ítriv fyri áhugað
Mikudagin 23. juni
Prát og sangur
Hósdagin 24. juni
Boccia v/ Jóhan Danielsen
Fríggjadagin 25. juni
Vit møtast kl. 15 við Sjómansheimið í Runavík. Vitjað í urtagarðinum hjá Esther og John Poulsen og fáa frágreiðing um fyrstu niðursetufólkini í Runavík. Aftaná opið hús hjá Jensinu.

Summarfrí verður frá 28. juni til 6. september 2004. Gott summar ynskir Fløvin.

Tú fært altið ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmoðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

Føroya Heimavirksifelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

»Um nakar ikki verður verandi í mær, verður hann kastaður út sum ein grein og følnar«
(Jóh. 15, v. 6).

Í gomlu søgnini um gásadalsrisan Tóra rama og mykinesbúgvan, nevndur Óli rami, hann, sum at enda vann sigur á risanum í harða bardaganum teirra millum, mátti risin fyri at tiggja lív lova mykinesbúgvanum 3 sjaldsamar lutir, sum framyvir á hvørjum ári skuldu koma til Mykinesar, m.a. eitt stórt rekatræ; men eina varð lagt við, at ikki mátti gávan spottast ella speirekast, tí so fóru teir at missa hana med alla.

Er tað ikki sama áminning, okkum verður givin í orðunum, har vit verða ámint um, at greinarnar kunnu missa sambandið við træið – at sjálvsagdi felagsskapurin, ið skuldi verið har millum træið og tess greinar kann forkomast og missast. Og tí verður heitt á okkum at verða verandi greinar á trænum, og so sjálvandi ikki at spotta ella speireka hesa okkara gávu og lívssamband, sum tá ið greinarnar fara til hendurs at berjast sínámillum – tá tann eina greinin frøist yvir vanlagnu hjá grannagreinini, ella ein onnur roynir við hóttanum og veipanum at kappa greinina omanfyri av ella ein triðja roynir at royta nálir og bløð av greinini í neðra fyri soleiðis at fríðka seg sjálva – heldur enn at tær allar áttu at peika á tað træið, har tær vóru settar og í lívi og levnaði royndu at byggja upp og lívga um træið heldur enn við sjálvsøkni og maktgirnd bara at hugsa um sjálvan seg og sína egnu grein. Eitt træ er ein heild, har allar greinarnar eiga at sleppa upp í part – har tær allar fingu sína uppgávu at røkja, og so skuldi verið sjálvsagt, at tær allar virdu hvørja aðra aldantið, at uttan træið eru tær einki, sum eisini út frá teirri sannroynd, at heldur ikki træið kann verða greinarnar fyriuttan. Trænum nýtist greinarnar fyri at vera eitt træ, og missir træið greinarnar, ella fara greinarnar í sjálvsøkni at kappa hvørja aðra av ella kappa av sambandið við træið, so verður ikki leingi, at træið følnar og doyr. Og tá hava vit sjálvi sagað ta greinina av, har vit sita og vóru sett.

At tað lættliga kann henda, verða vit ámint um í dag; men so skulu vit við myndini av trænum eisini hoyra gleðiboðini um, at við Jesusi er ikki talan um nakað vanligt træ, heldur ikki víntræ. Ja, hann er og verður eitt løgið, óskiljandi træ, sum hvør ein urtagarðsmaður mundi havt ringt eyga á, tí hetta træið er longu felt. Langa fríggjadag høgdu teir træið niður, og júst tá kom tað – enntá í deyðanum – at bera mikla frukt. Hetta træið, sum okkum óskiljandi fær sítt lív frá hinum æviga Guði – træið, sum heldur ikki deyðin kundi gera enda á, men ið sum krossins træ ber okkum gleðiboðini um, at eisini har vit snávaðu og sviku, har var hann verandi álitið, og har vit í synd okkara royndu at fella træið, har vildi Guð tað øðrvísi.

Martin Restorff Jacobsen

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo

Billettprísur: 70,- kr.
Leygardagin 19.06. kl. 16[15]
Leygardagin 19.06. kl. 19[30]
Sunnudagin 20.06. kl. 16[00]
Sunnudagin 20.06. kl. 19[15]

Leygardagin 19.06. kl. 22[45]
Sunnudagin 20.06. kl. 22[30]

Leygardagin 19.06. kl. 21[00]
Sunnudagin 20.06. kl. 19[45]

Leygardagin 19.06. kl. 18[30]
Leygardagin 19.06. kl. 23[30]
Sunnudagin 20.06. kl. 17[00]
Sunnudagin 20.06. kl. 22[15]

P BIO KIOSKIN P
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.